

*Kristian Magnussen og Katrin Dahl Jakobsen, tingfólk Javnaðarfloksins á tíðindafundinum gjáramorgunin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vallyfti fyri 116 mió

**– Øll tey lyfti, vit hervið hava bundið okkum til, kunnu vit loysa fyri 116 milliónir, segði Jóannes Eidesgaard á tíðindafundinum týsmorgunin**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

Javnaðarflokkurin hevur gjørt útrokningar, sum vísa, at eftir fýra árum økjast útreiðslurnar av teimum vallyftum, flokkurin gevur, við 194 milliónum krónum. Men av tí at skattainntøkur landskassans eisini økjast av hesum, verður nettoútreiðslan »bara« 116 milliónir krónur.

– Hetta kunnu vit bera saman við, at sitandi samgonga hevur økt útreiðslurnar á fíggjarlógini við 950 milliónum farnu fýra árini, so hetta skuldi ikki verið nakar trupulleiki, sigur Jóannes Eidesgaard.

Flokkurin hevur gjørt eina ætlan um, hvussu útreiðslurnar skulu økjast tey fýra árini í komandi valskeiði.

Íløgur til ellis- og røktarheim verða frá landsins síðu 20 milliónur um árið, tilsamans 80 milliónir. Eftir galdandi lóg er landsins partur 50%, meðan kommununnar partur eisini er 50%.

– Vit eru greið um, at hetta kann gerast trupult hjá kommununum, og tí ætla vit møguliga at broyta skipanina, segði Jóannes Eidesgaard á tíðindafundinum.

Hóast land og kommunur býta íløgurnar til røktarheim, so er tað landið, sum rindar allan raksturin. Javnaðarflokkurin metir, at útreiðslurnar til rakstur økjast 15 milliónir um árið, tilsamans 60 milliónir alt valskeiðið, har landið ber allar útreiðslurnar.

Annar stórur útreiðslupostur av vallyftum Javnaðarfloksins er tvífaldaða barnsburðarfarloyvið við løn. Hetta fer at kosta landskassanum aðrar 60 milliónir eftir fýra árum.

Javnaðarflokkurin legði uppskot fyri tingið herfyri um at fáa í lag ein systkinaavsláttur, so at fólk við fleiri børnum einans skulu gjalda fult fyri fyrsta barnið. Hetta uppskotið fall í tinginum, men er hetta millum tey mál, sum Javnaðarflokkurin ætlar sær at fremja í komandi samgongu. Men flokkurin lovar, at hetta ikki fer at føra til øktar útreiðslur fyri kommunurnar – hóast kommunurnar hava tikið yvir barnaansingarøkið – so ætlar Javnaðarflokkurin at landið skal bera øktu útreiðslurnar av hesi skipan, sum flokkurin sigur er 10 milliónir um árið.




*– Vit hava gjørt eitt ítøkjuligt valupplegg, til tess at borgarin púra greitt skal vita, hvat hann fær burturúr, um hann velur Javnaðarflokkin til valið komandi, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Javnaðarflokkurin sett skjøtil á valstríðið:

# Veljarin skal vita hvat hann fær frá Javnaðarflokkinum

**Javnaðarflokkurin hevur gjørt eitt valupplegg, ið greitt skal vísa veljaranum, hvat hann fær burtur úr at velja Javnaðarflokkin**

POLITIKUR
*Eirikur Lindenskov*

– Vit hava hesaferð valt at gjørt eitt ítøkjuligt valupplegg, til tess at borgarin púra greitt skal vita, hvat hann fær burturúr, um hann velur Javnaðarflokkin til valið komandi.

Hetta segði Jóannes Eidesgaard, tá hann í gjár legði fram valskránna hjá Javnaðarflokkinum fyri fjølmiðlarnar. Javnaðarflokkurin legði fram eina skrá, har tann ovasta yvirskriftin snúði seg um eldrapolitikk. Jóannes Eidesgaard segði, at hesi mál eru tey, sum flokkurin leggur størstan dentin á. Flokkurin hevur ikki øll málini við í hesi skrá, men hetta eru tey, sum flokkurin heilt vist fer at fremja, kemur hann í samgongu.

Flokkurin bindur seg til, at skapast skulu 160 nýggj ellis- og røktarheimspláss í komandi valskeiði. Eisini skal skipast ein døgnrøktarskipan, og pensjónin skal hækka til 10.000 krónur til stakar pensjónistar og 16.000 krónur til hjún.

Næstovast á breddanum hjá Javnaðarflokkinum er ríkisrættarliga støðan.

Flokkurin leggur dent á, at sjálvstýrislógin er tann savnandi loysnin, sum um 60% av fólkinum tekur undir við, og tað verður ein skipan henni lík, ið flokkurin fer at virka fyri. Hon skal m. a. innihalda, at Føroyar og Danmark í ríkisfelagsskapi verða javnsett sum lond, og at henda nýggja avtalan, sum greitt skal áseta rættindi, skyldur og møguleikar, skal fráboðast ST.

### Burtur við bíðilistum

Á heilsuøkinum bindur flokkurin seg til, at bíðilistarnir á sjúkrahúsunum skulu burtur.

– Tað kann als ikki góðtakast, at fólk skulu bíða í fleiri mánaðir eftir at sleppa til skurðviðgerð, segði Jóannes Eidesgaard, sum segði, at ein handlingsplan skal gerast, so bíðilistarnir fáast burtur eftir einum ári.

Flokkurin ætlar eisini at styrkja uppvenjingina eftir sjúkratilburð, t. d. at fólk eftir heilabløðing ikki verða send av landinum til uppvenjingar, tá vit bæði hava útbúgvið starvsfólk og fysisku karmarnar til at hava uppvenjingina í Føroyum.

Annað mál á heilsupolitiska økinum hjá Javnaðarflokkinum er at fremja fólkaheilsuna.

– Vit skulu røkja heilsuna við t. d. at skapa arbeiðsumstøðurnar soleiðis, at fyrilit verða tikin fyri hesum, segði Jóannes Eidesgaard, sum vísti á, at vit skulu verða meira tilvitað um heilsustøðuna. Hann segði, at serliga menn ofta koma illa fyri, tí hetta ikki verður tikið í nóg stórum álvara. Hann vísti á, at vit á tannheilsuøkinum veruliga hava gjørt nakað við tað, at børn frá 0 til 16 ár regluliga verða kannað. Hetta helt hann verða góða fyrimynd.

Á eldraøkinum heldur Javnaðarflokkurin, at tey eldru sum longst skulu kunna búgva í egnum bústaði. Vit skulu eisini skapa eina smidliga skipan, tá tey fara av arbeiðsmarknaðinum, t. d. við at tey partvís kunnu verða pensjónistar, meðan tey partvís arbeiða.

Skipast skulu eisini mennandi tilboð til teirra í gerandisdegnum.

### Eitt ára barnsburðarfarloyvi við løn

Á familjupolitiska økinum sigur flokkurin, at familjan skal hava rætt til bústað fyri sámuligan prís. Flokkurin er í ferð við at gera eina ætlan, har farið verður undir at byggja øðrvísi bústaðir.

Barnsburðarfarloyvi, sum eftir galdandi skipan er eitt hálvt ár, verður longt til eitt ár við løn, eins og at skipað verður ansingartrygd, t. e. at øll børn, sum eru eitt ár ella meira, hava krav upp á eitt stovnspláss.

– Tá barnsburðarfarloyvið verður longt við einum hálvum ári, so tekur hetta eisini trýstið av tørvinum á plássum. Tí er tað realistiskt at binda seg at veita øllum børnum ansingarpláss, sigur Jóannes Eidesgaard.

Menningartarnað og fólk við fysiskum breki skulu hava betri møguleikar at koma út á arbeiðsmarknaðin. Javnaðarflokkurin fer at binda seg til at skapa í minsta lagi 50 vard størv til hesi fólk og 30 nýggj búpláss.

Á ungdómspolitiska økinum sigur Javnaðarflokkurin fyrst og fremst, at vit skulu hava ein góðan skúla. Skapast skulu 50 lestrarbústaðir, annaðhvørt sum kollegiurúm ella sum íbúðir. Flokkurin leggur eisini dent á, at virkis-, ítrívs- og mentunartilboð skulu verða fyri øll ung, eisini tey, sum ikki fara bókliga vegin.

### Verkafólkið greið setanarviðurskifti

Verkafólkið skal hava greið setanarviðurskifti.

– Tað er stór skom, at fólk, sum t. d. verða sett í starv á einum fiskavirki, ikki hava krav upp á at fáa alt at vita um rættindi og skyldur, og at starvsviðurskiftini annars verða greitt avtalað, sigur Jóannes Eidesgaard.

Flokkurin sigur, at øll skulu

# Samveldissáttmáli millum Føroyar og Danmark

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

– Politiskt forstáilsi er bæði frá danskari og føroyskari síðu, so tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki at fingið sjálvstýrismálið avgreitt gjøgnum summarið, segði Jóannes Eidesgaard á tíðindafundinum týsmorgunin.

Javnaðarflokkurin ætlar, at gerast skal ein samveldissáttmáli millum Føroyar og Danmark, sum verður karmur um nýggju skipanina, sum verður ein politisk avtala millum londini. Samveldissáttmálin skal fráboðast ST, og merkir tað, at báðir partar altjóðarættarliga eru bundnir at halda sáttmálan.

– Sáttmálin hevur m. a. við sær, at ongar forðingar verða fyri yvirtøkum, talan verður ikki um eina »delegatiónslóg«, har Danmark kann taka rættindi aftur og løgtingið verður hægsti myndugleiki føroyinga, sigur Jóannes Eidesgaard.

Javnaðarflokkurin sigur eisini, at í sáttmálanum skal greitt standa, hvussu farast skal fram, um vit ætla okkum úr ríkinum, men Jóannes Eidegaard leggur dent á, at samveldissáttmálin als ikki hevur fullveldi sum endamál, eins og íslendski sáttmálin hevði á sinni.

Jóannes Eidesgaard sigur, at nýggja skipanin millum Føroyar og Danmark kann vara í 20 ár, ella í 50 ella 100 ár.

– Men vit eru sjálvandi noydd at tryggja okkum, at mannagongdin verður staðfest, um Føroya fólk einaferð ger av at fara úr samveldinum við Danmark, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann nevnir møguleikan, um Danmark einaferð í framtíðini verður ein intigreraður partur av einum evropiskum samveldi, so kann tað verða ein fyrimunur fyri Føroyar at verða uttanfyri.



*Sambært Jóannes Eidesgaard, so kann sjálvstýrismálið verða loyst í summar...*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Spurningin um donsku grundlógina heldur Javnaðarflokkurin ikki verða nakran trupulleika.

– Vit hava hoyrt tey, ið tulka hetta so fundamentalistiskt, at tað ikki ber til at gera eina samveldisavtalu, hóast vit eru í sama ríki. Men hetta er eingin trupulleiki. Tað ber væl til at gera eina politiska avtalu, sum



*Hans Pauli Strøm og Dan R. Petersen, tingmenn, Eyðólv Dimon, floksskrivari, og Henrik Old, tingmaður*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Arbeiðsmarknaðargjøldini verða 3,5%

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

Javnaðarflokkurin ætlar at hækka arbeiðsmarknaðargjøldini, sum í dag eru 2.0% til 3.5%. Í dag hava vit trý arbeiðsmarknaðargjøld: Gjaldið til Barnsburðargrunnin, Samhaldsfasta og Arbeiðsloysisskipanina.

Javnaðarflokkurin skjýtur upp, at vit eisini fáa eitt gjald til Arbeiðsmarknaðarútbúgving, AMÚ, sum skal fíggja útbúgvingskeiðsvirksemi hjá verkafólkinum.

– Í Føroyum eru vit so bangin fyri arbeiðsmarknaðargjøldum, men bera vit saman við Danmark, so eru arbeiðsmarknaðargjøldini í Danmark 9%, meðan tey í Svøríki eru um 12-13, sigur Hans Pauli Strøm, tingmaður Javnaðarflokskins.

Gjøldini skulu sambært Javnaðarflokkinum hækkast soleiðis:

| | 2002 | 2005 |
|---|---|---|
| Barsilsskipanin | 0.25% | 0.25% |
| AMÚ | 0.00% | 0.25% |
| Samhaldsfasti | 0.50% | 2.00% |
| ALS | 1.25% | 0.75% |
| Gjøld tilsamans | 2.00% | 3.50% |